# Likamlig revsing er eyðmýkjandi

**–At likamliga revsa børn er bæði eyðmýkjandi og sálarliga niðurbrótandi. Tá kropslig makt av einum størri og sterkari persóni, bæði sálarliga og kropsliga, verður nýtt ímóti einum barni, missir tað virðingina fyri foreldrunum. Hetta sigur Sigrun Samuelsen, sum er sálarfrøðingur í barnaverndini hjá Tórshavnar Býráð**



*Børnunum skulu nú tryggjast betri rættindi. Uppskot er nú komið fram á ting, sum sigur, at tað skal verða bannað likamliga at revsa síni børn*

*Tilvildarlig mynd*

HARÐSKAPUR
*Ingrid Bjarnastein*

Uppskotið, sum Javnaðarflokkurin hevur lagt fram á tingi sigur, at tað skal vera bannað at revsa børn likamliga. Vit hava sett sálarfrøðinginum í barnaverndini hjá Tórshavnar Býráð, Sigrun Samuelsen, stevnu og sett henni nakrar spurningar hesum viðvíkjandi.

– Tað vísir seg, at revsa børn likamliga hevur ikki ta ávirkan ein vil tað skal hava. Foreldur brúka tað, tí tey halda, at tað hjálpir og at børnini verða betur at hava við at gera og fara at akta betur. Og tað hjálpir ta løtuna, men í longdini riggar tað ikki, tí tað fær ikki børnini at hugsa seg betur um, sigur Sigrun Samuelsen.

Hon sigur eisini, at børn, sum verða likamliga revsað, verða eyðmýkt.

– Tá eitt foreldur, sum bæði er størri og sterkari kropsliga og sálarlig, brúkar makt yvirfyri barninum, virkar hetta sálarliga niðurbrótandi. Barnið missir virðingina og álitið á foreldrunum.

### Vreiði

At likamliga revsa børn skapar eina fjarstøðu millum barn og foreldur.

– Børn, sum eru von við likamliga revsing uppbyggja eina vreiði. Tey halda fyri tað fyrsta, at tað er í lagi at brúka harðskap fyri at fáa sín vilja. Eg giti ikki, at foreldur brýggja seg um, at børn brúka harðskap at loysa eina trongstøðu, og hví skulu tey so gera tað?, sigur Sigrun Samuelsen.

Vreiðin, sum børnini fáa ígjøgnum revsingina, kemur til sjóndar aftur í kynsbúningini.

– Likamliga revsingin oyðileggur sambandið millum børn og foreldur og vreiðin kemur fram aftur í kynsbúningini. Tá er tað at virðingin skal standa sína roynd, og tá er tað týdningarmikið, at hava eitt samband við barnið, har tosað hevur verið um trupulleikarnar.

At børn verða likamliga revsað, síggja tey so sjálvi sum ein hátt at fáa sín vilja ígjøgnum. Tá tey kenna seg maktarsleys, so brúka tey harðskapin, tí tey vita ikki, hvat annað tey skulu gera.

– Tey, sum eru revsað likamliga sum børn, føra tað ofta víðari í síni egnu uppaling. Hjá teimum koma hendurnar ofta at sita eitt sindur lættari.

Sigrun Samuelsen sigur, at foreldur leggja tó ikki ætlanir um at sláa børnini. Tað er nakað tey gera, tí tey eru ørkymlað, maktarleys og ill, og tí koma tey til at sláa.

– Tað eru eisini fleiri, sum halda, at tú kanst gott sláa títt barn uttan at vera illur. Men tey, sum hava so mikið tamarhald á sær sjálvum, at tey ikki eru ill tá tey sláa, teimum nýtist ofta als ikki at sláa. Tað er meira ideologiin í tí fyri tey.

Hinvegin, so skammast tey, sum sláa av tí.

### Hugburður broyttur

Sálarfrøðingurin heldur, at hugburðurin til børn er broyttur ígjøgnum tíðirnar. Nú verða børn uppfatað sum menniskju, ið vit eiga at vísa virðing fyri.

– Teimum foreldrum, sum sláa, eiga vit at hjálpa teimum at broyta hugburð. Tosa við barnið og vís teimum uppá aðrar mátar, at tú meinar tað, tú sigur. Tað skal eisini verða vekt aftanfyri tíni orð, so um tú slær, so missa orðini sín týdning. Børn flest eru til at tosa við. Um tú so ert líka við at sláa, so er tað betri at fara út – í eitt annað rúm, greiðir Sigrun frá.

At sláa børn er ikki nakað foreldur reypa sær av. Heldur tvørturímóti. Sigrun sigur, at í sínum arbeiði hevur hon ofta ringt við at fáa foreldur at viðganga, at tey sláa síni børn. Men nøkur gera tað.

– Tey vita væl, at tað er skeivt og ósunt fyri barnið, og tey uppdaga eisini, at tað hjálpir ikki í longdini. Men hetta er nakað tey gera, tí tey vita ikki, hvat annað tey skulu gera.

Tá børn gerast trupul, so kann likamliga revsingin væl vera ein partur av trupulleikunum, tey hava.

– Hetta skal tó ikki skiljast sum foreldur ikki skulu seta krøv til síni børn og vísa teimum autoritet. Tí tað skulu tey jú, sigur Sigrun. Hon heldur, at tað er fínt, at hetta evnið er komið fram á tingið, tí øll londini rundanum okkum hava jú hesa lógina.

– Vit skulu tó ikki vænta, at lógarbroytingin fer at broyta uppalingarmynstrið. Men tað er signalið vit senda út, at vit góðtaka tað ikki, sum hevur nakað at siga. Tú kanst ikki brúka harðskap yvirfyri øðrum børnum ella vaksnum, so hví skalt tú hava loyvi til tað yvirfyri tínum egnu, spyr Sigrun Samuelsen, sálarfrøðingur hjá barnaverndini í Tórshavnar Býráð, at enda.



*Sigrun Samuelsen er sálarfrøðingur hjá barnaverndini í Tórshavnar Býráð. – Foreldur vita væl, at tað er ósunt og skeivt at sláa barn sítt. Men hetta er nakað tey gera, tí tey eru ørkymlað og maktarleys, sigur hon*



# Kall arbeiðir á Skálafjørðinum

**Menn, sum starvast hjá Kalli, hava seinastu dagarnar arbeitt uppi á Høganesi í Nes kommunu til tess at útbyggja gsm-skipanina hjá felagnum. Næstu stigini verða Støðlafjall og síðan Brúnaskarð á Borðoynni**

SAMSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*

Í vikuni hava Terji Leitisstein og Marni Abrahamsen arbeitt við at seta upp gsm-skipan í húsinum og mastrini, ið Teletech hevur á Høganesi í Nes kommunu.

Hetta er ein liður í útbyggingini av gsm-netinum hjá Kalli.



*Húsið og masturin, sum Teletech hevur á Høganesi til tráleyst internet. Nú leigar Kall seg inn her og er í ferð við at seta upp eina gsm-skipan*

Teletech hevur bygt húsið og eigur mastrina, sum felagið brúkar til tráleyst internet til Skálafjørðin og sum millumstøð millum Klaksvíkina og Tórshavn.

Kall hevur nú leigað seg inn í húsið og mastrina.

### Fimta gsm-støðin

Terji Leitisstein, sum starvast hjá Kalli, sigur, at arbeiðið á Høganesi fer at taka nakrar dagar.

Hósdagin og fríggjadagin vóru teir á Høganesi, og nú verður bíðað eftir meira útgerð til støðina. Síðan verður farið niðanaftur.

- Sum er, dekka vit Havnina við fýra gsm-støðum. Hetta er fimta støðin, vit seta upp. Síðan verður farið uppá Støðlafjall og Brúnaskarð á Borðoynni.

Terji sigur, at støðirnar á Høganesi og Støðlafjalli skulu gera tað møguligt hjá felagnum at dekka allan Skálafjørðin og ein part av Gøtu, og við støðini á Brúnaskarði røkkur felagið viðskiftafólkunum í Klaksvík og Leirvík.

- Málið er, at okkara viðskiftafólk í framtíðini skulu brúka okkara egna gsm-net.

Næsta stigið eftir Brúnaskarð, verður væntandi at røkka Gøtunum og Fuglafirði.

### Room-skipan

Terji sigur, at Kall leigar seg inn á gsm-netið hjá Føroya Tele, men so hvørt, felagið útbyggir sítt egna net, heldur tænastan, felagið keypir frá Føroya Tele, uppat. Hetta er ein partur av avtaluni millum feløgini.

- Hetta er ein sonevnd room-skipan ella »reiking«, sum tað nú eitur á føroyskum. Skipanin er hin sama, sum tá ið tú fert uttanlands við gsm'ini; tá slepst inn á netið hjá øðrum útbjóðarum, og skiftið fer fram av sær sjálvum.

Terji Leitisstein dylur ikki, at tað er ein fíggjarligur fyrimunur fyri Kall at hava sítt egna gsm-net.

- Men tað fer at taka rúma tíð, áðrenn vit røkka út um alt landið, sigur hann.

# Fýra línuskip landað í Klaksvík



*Seinasta túr hevði Ågot 170.000 pund av línufiski.*
*Polarstjørnan, Kvik og Núpur, sum eisini hava landað í vikuni, høvdu ávikavist 140.000, 80.000 og sløk 120.000 pund í part.*

**Á Fiskamarknaðinum í Klaksvík merkja tey ikki nógv til norðhavsróðurin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í vikuni hava línuskipini, Kvik og Núpur, selt um Fiskamarknaðin Føroya í Klaksvík, og Ågot og Polarstjørnan hava selt beinleiðis til Kósina.

Kvikk, sum landaði mikudagin, hevði sløk 80.000 pund og Núpur, sum landaði hósdagin, hevði sløk 120.000 pund.

Ågot og Polarstjørnan høvdu ávikavist, 170.000 og 140.000 pund í part.

Á Fiskamarknaðinum í Klaksvík siga tey seg ikki hava merkt nakað serligt til norðhavsróðurin.

- Vit vænta, at flestu bátar, sum royna við snellu eftir várfiski, leggja veiðina upp á Eiði og øðrum bygdum norðanfyri, siga tey í Klaksvík.

Fiskamarknaðurin selir tó fiskin hjá nógvum útróðrarbátum í Klaksvík, sum eru úti, tá roynandi er. Fleiri royna við línu og onkur við snellu.

- Seinastu dagarnar hevur streymurin verið harður, men nú fer hann at linka aftur.

Útróðrarbáturin, Gudrun, seldi um Fiskamarknaðin í Klaksvík fríggjadagin; teir høvdu 7.000 pund á eini setu.

# Útbyggja ítróttarhøllina og leggja slitlag á vøllin

**Ásbjørn Mikkelsen, formaður í mentanarnevndini hjá Skála kommunu, sigur, at ítróttin er eitt stórt aktiv hjá kommununi og ein týðandi liður í at fremja trivnað**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*

**Skála:** Á Skála eru tey ikki í iva um tann týdning, sum ítróttin hevur fyri kommuna. Tí verður roynt at gera umstøðurnar hjá ungdóminum so góður, sum yvirhøvur gjørligt.

Í løtuni verður ítróttarhøllin útbygd við einum umleið 40 fermetra stórum tilbygningi norður úr durinum.

Asbjørn Mikkelsen, formaður í mentanarnevndini hjá kommununi, sigur, at talan er um eitt felagshøli til ítróttarfelagið í bygdini.

- Kommunan rindar tilfarið til byggingina, og síðan verður arbeiðið gjørt sjálvboðið. Hetta er ein háttur, vit í fleiri førum hava brúkt, tá ið ræður um ítróttin, sigur hann.

Áður hevði ítróttarfelagið eitt felagshøli í landnyrðingshorninum í ítróttarhøllini, men hetta hølið er ikki tókt longur.

### Nýtt slitlag

Asbjørn veit at siga, at kommunan eisini fer at leggja nýtt slitlag oman á vøllin í høllini.

- Hetta verður gjørt, tá ið vetrarkappingarnar eru av, helst í mai.

Vøllurin verður fyrst umvældur, og síðan verður nýtt lag lagt omaná, eins og gjørt er í ítróttarhøllini í Runavík. Ætlanin er at leggja grønan lit omanyvir tað, sum er, sigur hann.

Tað var umsjónarmaðurin, Karlo Poulsen, ið mælti til at leggja nýtt slitlag omanyvir tað gamla.

- Vit hava hugt at, hvussu út sær. Gamla lagið er farið í støðum, og vit eru samdur um, at tíðin er komin at leggja nýtt lag á vøllin.

Karlo Poulsen hevur verið umsjónarmaður í høllini á Skála í nógv ár, og nú hann er pensjóneraður, er nýggjur maður, Eyðbjørn Joensen, settur sum umsjónarmaður. Karlo loysir tó framvegis av í høllini, eitt nú í vikuskiftunum.

Eyðbjørn og konan, Sigurlaug, reka eisini kafeteria, sum er í ítróttarhøllini á Skála.

### Fysioterapi

Asbjørn sigur, at ítróttarfeløgini á Skála og Strondum hava tikið stig til at keypa ein bonk, har til ber at viðgera ítróttarskaðar við fysioterapi.

- Vit hava játtað okkara part av stuðlinum til keypið, og eg havi skilt, at Sjóvar kommuna hevur játtað sín part.

Ætlanin er, at bonkurin skal hava støð í høllini á Skála, og feløgini skulu sjálvi syrgja fyri, at fysioterapeutur er á staðnum, tá ið ítróttarkappingar eru, bæði í høllini og úti á fótbóltsvøllinum.

- Við hesum verður møguligt hjá fólki, sum fáa skaða, at fáa viðgerð á staðnum beinanvegin, sigur Ásbjørn Mikkelsen, formaður í mentanarnevndini hjá Skála kommunu.

Hann heldur at enda, at ítróttin er eitt stórt aktiv hjá kommununi og ein týðandi liður í at fremja trivnað.